Landssjúkrahúsið



# Vælkomin á P40 / PI
# Psykiatriski depilin

**<u>Vælkomin á P40/PI</u>**

Endamálið við hesum faldara er at kunna um ymisk viðurskiftir, ið eru viðkomandi í samband við innlegging á Psykiatriska deplinum.

P40 er skipað í tvær deildir:

PI, sum er ein intensiv og akutt móttøkudeild

PA, sum er ein opin deild

PI er ein seingjardeild við 7 plássum, sum tekur ímóti sjúklingum, ið eru 18 ár og eldri. Um børn og ung hava tørv á innlegging, samstarvar deildin við barna- og ungdómspsykiatriina (B&U).

Øll sum verða innløgd á PI, verða av trygdarávum kannaði fyri at vita, um tey hava lutir uppiá sær, ið kunnu verða til vanda fyri tey sjálvi og/ella onnur.
Starvsfólki hevur hesar lutir í varðveitslu undir innleggingini.

Á PI starvast sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktarar í tøttum samstarvi við onnur fakfólk, sum eru viðkomandi í gongdini til, at tú kemur fyri teg aftur.

## Psykiatrisk viðgerð

Málið við innleggingini er at finna fram til, hvat tað er sum gevur trupulleikar og at hjálpa upp á hesar. Í summum førum merkir tað, at roynt verður at finna fram til eina diagnosu og at leggja viðgerðina til rættis soleiðis, at hon samsvarar við tær avbjóðingar, sum standast av sjúkueyðkennunum. Tá talan er um viðgerð, er heilivágur oftast ein partur av samlaða tilboðnum, sum hevur til endamáls at at styrkja tínar møguleikar at skilja tína sjúku, at handfara støðuna nú og at læra teg at gerast var/ur við sjúkueyðkenni so skjótt sum gjørligt, skuldi sjúkan kykna aftur.

Á deildini verður arbeitt miljøterapeutiskt. Endamálið við miljøterapi er at styrkja praktiskar og sosialar førleikar, og tað verður gjørt við ymiskum aktivitetum. Aktvitetirnir taka støði í sálarfrøðiligum og námsfrøðiligum grundgevingum.

## Ábyrgdarpersónar á deildini

Ábyrgdarpersónarnir hava ábyrgd fyri at stuðla og motivera sjúklinginum í gongdini til at koma fyri seg aftur og at tryggja framdrátt og samanhang í

sjúklingagongdini. Teir hava yvirskipaða ábyrgd fyri, at tilboðini sum sjúklingurin skal hava sambært avtalum á ráðleggingarfundum og leiðreglum á deildini, verða útint.

Tá tú verður innlagdur, fær tú tillutað tveir ábyrgdarpersónar. Vit miðja í móti, at tú so ofta sum til ber kann fáa fatur á øðrum av tínum ábyrgdarpersónum í annahvørt dag- ella kvøldvakt. Men av tí, at starvsfólk arbeiða í dag-, kvøld- og náttarvakt, býtt út á alla vikuna, ber ikki til at tryggja hendan møguleikan hvønn dag. Tú fær tó ein ávísan persón at venda tær til dagliga, sum vit nevna kontaktpersónur. Um ein av tínum ábyrgdarpersónum er til arbeiðis, verður viðkomandi tín kontaktpersónur tann dagin. Um ikki, verður tað onkur annar í starvsfólkahópinum.

## **Fysiskur aktivitetur**

Fysioterapeutur kemur á deildina dagliga og venur við teimum sjúklingum, sum hava fingið ávísing til fysioterapeutiska viðgerð. Tá læknin metir tað verða ráðiligt, kann sjúklingurin venja í venjingarhølunum í fysioterapihølunum saman við starvsfólki. Tvær ferðir um vikuna kemur fysioterapeutur við á morgunfund og

ger fimleik saman við sjúklingunum.

**<u>Dagliga gongdin</u>**

| | |
|---|---|
| Morgunmatur | kl. 08.15 - 9.00 |
| Morgunfundur<br>Bert yrkadagar | kl. 11.00 -11.20 |
| Døgurði | kl.11:40 - 12:30 |
| Kaffi | kl. 13:00 |
| Nátturði | kl. 17.30 -18.15 |
| Kvøld drekka | kl.19.30 - 20:30 |
| Friður á deildini | kl. 22.30 |

**<u>Vaktarskifti</u>**

Vaktarskifti er kl. 7.00-7.30, kl.15.00-15.30 og kl.23.00-23.30. Ynskiligt er, at sjúklingar ikki órógva í vaktarskiftinum

## Fokus

Starvsfólkini hava fakligan fund, ið nevnist ”Fokus” kl.12.30-13.15 og 18.30-19.00.

Eitt starvsfólk vil vera tøkt hjá sjúklingunum, meðan Fokus er.

## Tvørfakligur ráðleggingarfundur

Hetta er ein fundur, har tann sum er innlagdur og tann ella tey avvarðandi, sum hann ella hon vil hava við, saman við teimum fakfólkum, sum hava týdning fyri at tann innlagdi kemur seg skjótt og væl, í felag finna fram til eina ætlan fyri hóskandi viðgerð, soleiðis at tann innlagdi aftur kann fóta sær í samfelagnum. Um hin innlagdi ikki sjálvur kann luttaka á fundinum, fær starvsfólk viðkomandi upplýsingar frá sjúklinginum, soleiðis at hansara rødd er við á fundinum hóast fráverandi

**Viðtala við andaligan leiðara**

Um tú hevur tørv á at tosa við prest ella samkomuleiðara, kunnu starvsfólkini hjálpa við hesum.

**Fysiskir karmar**

Á deildini eru einastovur. Baði-/vesihentleikar eru felags. Eisini hevur deildin uppihaldsrúm við sjónvarpi, vaskirúm, matstovu og tvær vitjanarstovur. Uttanduraøkið er eisini til sjúklingar at gagnnýta. Um summarið verður urtagarðurin nýttur til millum annað uttanduraspøl, at grilla og hugna.

**Vitjan**

Vitjanartíðin er millum kl 15.00 – 17.00 og kl 19.00-21.00

**Kamar**

Kamarið skal haldast ruddiligt, og skiftast skal á seingini eftir tørvi. Um tørvur er á tí, kunnu starvsfólk hjálpa við hesum.

Privatlívið skal virðast, og tí er ikki loyvi, at fara inn á kamarið hjá hvørjum øðrum.

## Køkur

Av reinførisorsøkum loyvir Heilsufrøðiliga Starvsstovan ikki, at sjúklingar hava atgongd til køkin. Allur matur ið verður borðreiddur, kemur frá høvuðskøkinum á Landsjúkrahúsinum.

## Klæðir

Møguleiki er at vaska klæðir á deilini. Sjúklingar hava sjálvir ábyrgd av hesum, men um tørvur er á tí, kunnu starvsfólk hjálpa.

## Útiloyvi

Útiloyvi verður givið í samráð við lækna, tó ber til at fara út i garðin, ið hoyrir til deildina.

## Avvarðandi

Avvarðandi verða boðin til samrøðu, og eru tey vælkomin at ringja á deildina, telefonnummar 304500

og biðja um P40 PI.

**Royking og opin eldur**

Deildin er roykfrítt umráðið, tó er roykirúm á PI.
Livandi ljós eru bannað.

**Virðislutir/peningur**

Vit mæla frá, at tú hevur størri peningaupphæddir ella virðislutir við tær í samband við innlegging. Deildin tekur ikki ábyrgd av møguligum missi ella skaða.

**Rúsevni**

Tað er hvørki loyvt at hava rúsdrekka ella rúsevni við sær inn á deildina, ella at vera ávirkaður av hesum.
Ikki er loyvt at hava orkudrykkir á deildini ella at drekka hesar, meðan tú er innlagdur.

**Fartelefon og fartelda**

Sum meginregla er fartelefon og fartelda ikki loyvd.
Myndatøka á eindini er undir ongum umstøðum loyvd.

## Trygd

Av trygdarávum eru ávís viðurskifti galdandi fyri sjúklingar á deildini. Allur heilivágur skal latast til starvsfólki. Tað er bannað at hava hvassar og /ella spískar lutir hjá sær ella við sær inn á deildina.

## Handil og umbýti millum sjúklingar

Ikki er loyvt at at selja ella býta um sínaámillum, meðan man er innlagdur.

## Tagnarskylda

Øll starvsfólk hava tagnarskyldu.
Tá tú verður innlagdur, verður tú biðin um at fylla út ”Váttan um samtykki”, har tú hevur møguleika til at játta ella nokta fyri, at starvsfólk á Psykiatriska deplinum kunnu samskifta við avvarðandi og viðkomandi fakfólk og stovnar um tína støðu.

## Avvarðandi

Avvarðandi eru vælkomin at ringja á deildina, tel nr 304500 og biðja um P40/PI. Ein faldari til avvarðandi er til taks á deildini.

## **Kærumøguleikar**

Til ber at kæra um heilsufakligt virksemi, fyristingarligt virksemi og um tvingsil í samband við psykiatriska viðgerð. Hetta seinasta slagið skal kærast til Psykiatrisku Sjúklingakærunevndina hjá Føroya Kærustovni.

Faldarar um vegleiðing til at kæra, finnur tú úti á gongini saman við øðrum faldarum. Starvsfólk hjálpa tær fegin at finna hesar fram.

Sí annars á heimasíðu okkara www.ls.fo fyri nærri kunning.

**<u>Vit ynskja tær at vera vælkomnan á P40/PI</u>**

**<u>Eirargarður 17</u>**



Landssjúkrahúsið